## Benitez hevði nýrastein



Venjarin hjá Liverpool, Rafael Benitez, var ikki við til dystin ímóti Arsenal um vikuskiftið. Orsøkin var, at Benitez ikki var komin heilt fyri seg aftur eftir eina skurðviðgerð. Benitez hevur havt nýrastein og var lagdur undir skurð í farnu viku. Hjálparvenjarin Sammy Lee hevur havt ábyrgdina av venjingini síðani, og hann leiddi eisini Liverpool undir dystinum ímóti Arsenal í gjár, sum endaði við javnleiki 1-1.

## City hevur munin á FCK

FC Keypmannahavn skal spæla ímóti Manchester City í UEFA Cup. Svenskarin Hans Backe hevur verið venjari í báðum feløgunum, og hann heldur, at City hevur munin á FCK. - Tað verður ikki lætt hjá Manchester City, men eg rokni við, at teir fara at keypa spælarar í januar og fara at stilla við einum sera sterkum liði ímóti FCK. City hevur munin við at spæla í heimsins sterkastu fótbóltskapping, sigur Hans Backe.

Neistin-StÍF 33-27(17-14):

# Neistin hevur beina finalukós

**Við sigrinum á StÍF skúgvaðu neistamenn strandingar til viks í oddastríðnum, og í løtuni tykjast teir bláu vera eitt sera gott boð upp á annað finaluplássið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at hava hingið væl í oddinum fyrsta fjórðingin av landskappingini, er tað av álvara farið at dragna hjá strandingum.

Leygardagin vitjaðu teir hjá Neistanum, og aftur hesa ferð gjørdist talan um tap. Og enntá talan um tap, har StÍF ongan tíð veruliga var í nær námind sigrinum.

Neistin var liðið, sum byrjaði dystin betur, og teir hóttu fleiri ferðir við at renna undan gestunum. Fyri steðgin eydnaðist tað tó fleiri ferðir hjá StÍF at svara aftur, men tað gjørdist dekan ov tungt, tá teir bláu við seks málum á rað øktu til 17-10 nakað fyri steðgin. StÍF fekk minkað nakað um aftur, men tá heimaliðið aftur økti í stórum beint eftir steðgin, var krútið púrasta uppi.



*Meistararnir úr Neistanum hava veruliga fingið spælið at koyra seinastu umførini. Hesa ferð høvdu teir ikki stórvegis trupulleikar av StÍF*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### FAKTA

**Neistin-StÍF 33-27 (17-14)**
10 min: 6-5
20 min: 10-8
40 min: 24-17
50 min: 27-23
**Málskjúttar**
**Neistin**: Tróndur Kragesteen 8, Blagoje Buha 7(1), Áki Mørk 6(1), Karl Herup Olsen 4, Finnur Hansson 4, David Edvardsen 2, Bogi Berg 1, Jugoslav Djumic 1
**StÍF**: Bárður B. Danielsen 7, Rúni Johansen 7, Mortan Hansen 4, André F. Danielsen 4, Alexandur Johansen 2, Bent Djurhuus 1, Hávardur Trýgvason 1, Pauli G. Hansen 1
**Brotskøst**: Neistin 4, StÍF 1
**Útvísingar**: StÍF 2
**Dómarar**: Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

### Í ongamannalandi

Hjá Neistanum hevur leikliga framgongdin verið stór seinastu dystirnar, og leygardagurin prógvaði í so máta, at teir skjótt kunnu venda tonkunum móti einum plássi í FM-finaluni. Kanska eru teir ikki einsamallir um at greiða tann spurningin, men í løtuni tykist eingin at standa teimum kurl, og ikki vigaði útivøllarsigurin móti H71 her fyri sera nógv í roknskapinum.

Hjá strandingum tykist kósin hinvegin vera sett í ongamannaland. StÍF var annars væl við fyrstu nógvu umførini av kappingini, men seinastu vikurnar er nógv mist, og eina mest tykist tað nú vera í steypakappingini, at teir kunnu gera vart við seg. Tað eru teir hinvegin eisini vanir við, so tað kundi væl hent seg, at teir enn eina ferð toppa longu í februar mánaði.

# So koppaði SÍ

**Sørvágskvinnurnar eru framvegis langt fremst, men á Kambsdali fekst sjón fyri søgn, at tað ber til at vinna á SÍ**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

SÍ hevur verið partur av fleiri sera tøttum dystum í ár, men hvørja ferð hevur tað eydnast sørvágskvinnunum at koppa dystinum til egnan fyrimun. Í øllum førum fram til hetta vikuskiftið, tí á Kambsdali var tað ÍF, sum hevði betra takið.

Enn eina ferð vórðu sørvágskvinnurnar noyddast út í fimm sett. Tann leiklutin hava tær roynt fleiri ferðir í ár, men nervarnir hjá ÍF vóru í minsta lagi líka sterkir, sum teir vóru tað hjá oddaliðnum, og so var fagnaðurin sjálvandi ovurstórur, tá seinasti bólturin varð sligin í gólvið.

Hóast tapið, so er SÍ framvegis langt fremst í deildini, og munurin til tey næstu er somikið stórur, at tær framvegis eru púrasta greiðir favorittar at vinna FM-heitið.

Í hinum dystinum hetta vikuskiftið vann KÍF tryggan sigur á TB, sum framvegis stríðist við at byggja sær eitt nýtt lið upp. Men tann leiklutin hava tey á Tvøroyri roynt somikið ofta, at duga at vísa neyðuga tolnið.

### Flogbóltsúrslit

**Eik-ligan, kvinnur**
**ÍF-SÍ** 3-2 (21-25, 25-12, 25-13, 23-25, 15-10)
**KÍF-TB** 3-0 (25-18, 25-17, 25-18)

**Eik-ligan, menn**
**ÍF-SÍ** 3-1 (25-21, 25-17, 25-27, 25-17)
**Fleyr-Mjølnir** 3-1 (25-19, 23-25, 25-15, 25-21)

